Løgrit nr. 1

# Løgfrøðilig støðumynd av COVID-19 kreppulógunum, sum eru settar í gildi í tíðarskeiðnum 18. mars 2020 til 7. apríl 2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Lógartænastan - Mai 2020

**Katrin Thorsvig Hansen**
**cand.jur.**

# Løgfrøðilig støðumynd av COVID-19 kreppulógunum, sum eru settar í gildi í tíðarskeiðnum 18. mars 2020 til 7. apríl 2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Lógartænastan - Mai 2020

# Løgrit

Ætlanin við løgritunum er at fáa ymisk løgfrøðilig evni lýst á føroyskum máli og úr einum føroyskum sjónarhorni.

Tað kann vera ein lýsing av ávísum løgfrøðiligum evni ella fyribrigdi, t.d. um kreppulóggávu, um gongd í haga ella annað evni, sum eitt embætisfólk heldur er áhugavert at lýsa og kunna onnur um. Kanska er eisini okkurt serføroyskt fyribrigdi, sum tað hevði verið áhugavert at skriva um.

Tað kann eisini vera ein breiðari lýsing av lóggávuni innan ávíst fakøki, t.d. almannalóggáva, fiskivinnulóggáva, skúlalóggáva o.tíl. Her kann í løgritinum t.d. verða upplýst, hvat endamálið er við fakligu lóggávuni, hvørjar meginreglur lóggávan er grundað á, hvussu umsitingin er skipað o.a.

Tað er lógartænastan, sum gevur út løgritini, men øll embætisfólk í stjórnarráðunum og teirra stovnum, sum hava serligan kunnleika innan ávist fakøki ella til eitt ávíst fakligt evni kunnu skriva løgrit.

Vónin er at løgritini við tíðini fara at vera við til at lýsa føroyskt lóggávu og fyrisiting.

Nella Festirstein
Deildarstjóri á lógartænastuni

**Løgrit nr. 1**

# Løgfrøðilig støðumynd av COVID-19 kreppulógunum, sum eru settar í gildi í tíðarskeiðnum 18. mars 2020 til 7. apríl 2020

Í tíðarskeiðnum 18. mars 2020 til 7. apríl 2020 eru 11 løgtingslógir (umframt eykajáttanarløgtingslóg fyri apríl 2020) samtyktar í Løgtinginum. Løgtingslógirnar hava til felags, at tær seta serligar reglur í gildi í sambandi við støðuna, sum er íkomin av COVID-19.

Endamálið við løgritinum er at gera eina løgfrøðiliga støðumynd eftir, at Løgtingið hevur samtykt 11 kreppulógir, og at lýsa løgfrøðiligar avbjóðingar, sum stinga seg upp av kreppulóggávuni. Umframt løgtingslógirnar, sum verða viðgjørdar í hesum løgriti, er ein røð av kunngerðum eisini settar í gildi í samband COVID-19. Hesar kunngerðir verða ikki gjøgnumgingnar í hesum løgriti.

## 1. Løgtingslógirnar

### 1.1. Løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Innlatan og gjaldskái 1. ársfjórðing 2020)

Broytingarlógin var partur av hjálparpakka I og útsetur freistina fyri avrokning av 1. avgjaldstíðarskeiði 2020 til í seinasta lagi 15. november 2020.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð.

### 1.2. Løgtingslóg nr. 23 frá 18. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan

Broytingarlógin setur úr gildi § 8 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan, sum ásetur, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyri 1. apríl setur fram uppskot til løgtingssamtykt um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina fyri næsta ár.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð og fer úr gildi 31. desember 2020.

### 1.3. Løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (COVID-19, dagpeningur vegna sóttarhald, endurgjald til arbeiðsgevara og víðkaður rættur til sjálvstøðug vinnurekandi)

Broytingarlógin var partur av hjálparpakka I og skal veita stuðul til privata arbeiðsmarknaðin. Broytingarlógin setur í gildi serligar reglur um at veita dagpening til persónar, sum ikki kunnu arbeiða, tí viðkomandi er í sóttarhaldi, um endurgjald til arbeiðsgevara, tá starvsfólk eru í sóttarhaldi, og um víðkaðan rætt til dagpening til sjálvstøðug vinnurekandi.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð, hevði virknað frá 12. mars 2020 og fer úr gildi 30. juni 2020.

**1.4. Løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin) (Tíðaravmarkað COVID-19 stuðulsskipan)**
Broytingarlógin var partur av hjálparpakka I og skal – eins og løgtingslóg nr. 24. frá 18. mars 2020 – veita stuðul til privata arbeiðsmarknaðin. Lógin ásetur, at sjálvstøðug vinnurekandi, sum ikki fær rikið virksemi vegna avleiðingar av tiltøkum, sum eru sett í verk fyri at basa spjaðing av COVID-19 undir ávísum treytum hevur rætt til stuðul, og at persónar, sum eru í starvi á privata arbeiðsmarknaðinum og sum verða send heim vegna avleiðingar av átøkum, sum eru sett i verk fyri at basa spjaðing av COVID-19, undir ávísum treytum hava rætt til stuðul.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð, hevði virknað frá 12. mars 2020 og fer úr gildi 30. juni 2020.

**1.5. Løgtingslóg nr. 42 frá 7. apríl 2020 um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (Fólkapensjonistar og starvsfólk rætt til dagpening vegna sjúku orsakað av COVID-19)**
Broytingarlógin var partur av hjálparpakka II. Broytingarlógin er ein tillaging av serskipanini, sum var sett í verk við løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 2020 grundað m.a. royndir, sum vóru gjørdar við hjálparpakka I í praksis. Tillagingin hevur við sær, at skipanin verður víðkað til eisini at fevna um pensjonistar og starvsfólk (ístaðin fyri løntakarar).

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð, hevði virknað frá 12. mars 2020 og fer úr gildi 30. juni 2020.

**1.6. Løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin) (Broytingar í tíðaravmarkaðu COVID-19 stuðulsskipanunum)**
Broytingarlógin var partur av hjálparpakka II. Broytingarlógin er ein tillaging av serskipanini, sum varð sett í verk við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 grundað m.a. á royndir, sum vóru gjørdar við hjálparpakka I í praksis. Broytingin hevði m.a. við sær eitt loft á, hvussu nógvur stuðul kann verða veittur í serskipanini.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð og fer úr gildi 30. juni 2020.

**1.7. Løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020 um lønarískoyti til persónar, 67 ár ella eldri, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, og sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19**
Løgtingslógin var partur av hjálparpakka II og var fyrsta nýggja høvuðslógin, sum var løgd fyri løgtingið í sambandi við hjálpartiltøk grundað á COVID-19. Løgtingslógin hevur til endamáls at tryggja, at pensionistar, sum eru á privata arbeiðsmarknaðinum, og sum orsakað av COVID-19 eru heimsendir, verða stillaðir á sama hátt, sum arbeiðstakarar undir 67 ár.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð, hevði virknað frá 12. mars 2020 og fer úr gildi 30. juni 2020.

**1.8. Løgtingslóg nr. 45 frá 7. apríl 2020 um stuðulsskipan til fyritøkur til fastar útreiðslur orsakað av COVID-19**

Løgtingslógin var partur av hjálparpakka II og er eins og løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020 ein nýggj høvuðslóg. Løgtingslógin skal verða við til at tryggja, at fyritøkur, sum hava afturgongd í umsetningi uppá 40% ella meira kunnu fáa upp til 75% av føstum útreiðslum í stuðli frá landinum.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð og hevði virknað frá 1. apríl 2020.

**1.9. Løgtingslóg nr. 46 frá 7. apríl 2020 um heimildir at víkja frá skyldum hjá fyritøkum á vinnufelagaøkinum og roknskaparøkinum orsakað av COVID-19**

Eisini henda løgtingslógin, sum var ein partur av hjálparpakka II, er ein nýggj høvuðslóg. Løgtingslógin heimilar landsstýrismanninum undir ávísum treytum at áseta reglur um frávik frá ávísum skyldum, sum sambært vinnufelaglóggávuni og roknskaparlóggávuni liggja á fyritøkum og deildum hjá útlendskum fyritøkum. Eisini kann landsstýrismaðurin undir ávísum treytum áseta reglur, sum gera tað møguligt hjá leiðsluni í fyritøkunum at víkja frá ásetingum í viðtøkunum hjá fyritøkuni ella samsvarandi avtalu, tá skyldurnar eru ásettar í vinnufelaglóggávuni og roknskaparlóggávuni.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð og fer úr gildi 1. januar 2021.

**1.10. Løgtingslóg nr. 47 frá 7. apríl 2020 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Longd freist at lata inn sjálvuppgávu hjá roknskaparskyldugum o.o.)**

Broytingarlógin var partur av hjálparpakka II og heimilar landsstýrismanninum at áseta reglur um, at løntakarar uttanlands, persónar, feløg og onnur, sum hava roknskaparskyldu, kunnu fáa freistina við at lata inn sjálvuppgávu longda.

Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð.

**1.11. Løgtingslóg nr. 48 frá 7. apríl 2020 um serligar reglur um próvtøkur orsakað av COVID-19**

Broytingarlógin var viðgjørd samstundis sum hjálpartiltøkini í hjálparpakka II og er tann einasta løgtingslógin, sum er viðgjørd í tíðarskeiðnum, sum ikki hoyrir undir málsøkið hjá Fíggjarmálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum ella Almannamálaráðnum. Í løgtingslógini fær landsstýrismaðurin í mentamálum heimild í kunngerð at víkja frá reglum um próvtøkur í fýra ymiskum løgtingslógum. Løgtingslógin kom í gildi dagin eftir kunngerð og fer úr gildi 1. oktober 2020.

**2. Nakrir høvuðstættir**

Í tí fylgjandi verða nakrir løgfrøðiligir høvuðstættir tiknir upp, sum á ein ella annan hátt trína serliga fram, tá fyrstu kreppulógirnar verða gjøgnumgingnar.

**2.1. Gildiskoma, virknaður og sólsetursásetingar**

Allar løgtingslógirnar hava vanligu ásetingina um gildiskomu, t.e. at lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð. Tað hevur verið fokus á at kunngera løgtingslógirnar so skjótt sum møguligt, og tær eru tí kunngjørdar sama dag, sum tær eru samtyktar.

Fimm av teimum 11 løgtingslógunum hava virknað aftur í tíð. Sannlíkt átti tað eisini at verði ásett í løgtingslóg nr. 43 frá 7. apríl 2020, at lógin hevði virknað aftur í tíð.

Av teimum fimm løgtingslógunum hava fýra virknað frá 12. mars 2020, meðan ein hevur virknað frá 1. apríl 2020. Orsøkin til, at 12. mars 2020 er virknaðardagfesting fyri flestu løgtingslógirnar er óiva, at hetta var dagurin, tá landsstýrið boðaði frá, at Føroyar vóru settar niður í ferð, og setti tiltøk í verk fyri at avmarka smittuspjaðing.

Undir nr. 3.3 í Rundskrivi um Lógarsmíð er greitt frá, at afturvirkandi virknaður í lógum gongur ímóti grundleggjandi meginreglum í einum rættarsamfelagi – sum er, at ein borgari bara er bundin av galdandi rætti – og tí eiga ásetingar um afturvirkandi virkna bara at verða nýttar í undantaksføri. Tað skal altíð verða grundgivið fyri, hví tað verður mett at vera neyðugt, at ásetingar skulu hava afturvirkandi virknað. Eru ásetingarnar tyngjandi fyri borgaran, krevur hetta enn gjøllari grundgeving. Ásetingar um at áleggja ella hækka revsing kunnu ikki hava afturvirkandi virknað.

Støðan, sum Føroyar komu í vegna COVID-19, er ógvuliga serlig og uttan fortilfeldi í nýggjari tíð. Støðan kom eisini í brádliga, og tí var tað ikki møguligt, at fyrireika lóggávu frammanundan, sum kundi taka hædd fyri støðuni, landið kom í. At fleiri av løgtingslógunum hava ásetingar um afturvirkandi virknað, er tí væl innanfyri teir vanligu løgfrøðiligu karmarnar.

Viðmerkjast skal, at allar løgtingslógirnar, sum hava ásetingar um afturvirkandi virknað, eru til fyrimuns fyri borgaran. Var í eini kreppustøðu neyðugt at smíða lóggávu, sum hevði virknað aftur í tíð, og sum var tyngjandi fyri borgaran, kundi støðan verið ein onnur.

Sjey av teimum 11 samtyktu løgtingslógunum hava sokallaðar sólsetursásetingar. Hetta merkir, at løgtingslógirnar uttan víðari fara úr gildi ein ásettan dag. Fýra løgtingslógir fara úr gildi 30. juni 2020, ein fer úr gildi 1. oktober 2020, ein fer úr gildi 31. desember 2020 og ein fer úr gildi 1. januar 2021. Í nr. 3.1.10 í Rundskrivi um Lógarsmíð verður í útgangsstøðinum mælt frá at nýta sólsetursásetingar í løgtingslógum. Orsøkin er m.a., at ein sólsetursáseting inniber, at lógin fellur burtur ein ávísan dag, sum kann hava við sær, at tað uppstendur eitt løgfrøðiligt tómrúm, um einki nýtt verður sett í staðin. Slík tómrúm kunnu hava við sær størri trupulleikar enn at ein lóg, sum ikki er tíðarhóskandi el.tíl. framhaldandi er galdandi.

Hóast mælt verður frá at nýta sólsetursásetingar í løgtingslógum, er einki løgfrøðiliga til hindurs fyri at nýta slíkar ásetingar. Serliga í kreppustøðum, sum Føroyar hava verið í seinastu tíðina orsakað av COVID-19, kann tað enntá verða serliga skilagott at nýta sólsetursásetingar. Hetta m.a. tí, at tað kann verða brúk fyri víttgangandi átøkum, sum einans skulu verða galdandi í styttri tíðarskeið, at tað verður

lættari at fáa politiskan meiriluta fyri einum uppskoti, og tí at løgtingslógir, sum eru skrivaðar í skundi, og tí møguliga kunnu innihalda feilir og eina óhepna rættarstøðu uppá sigt, fara úr gildi automatiskt, uttan at politiski myndugleikin skal fyrihalda seg til lógina av nýggjum.

**2.2. Heimildir til landsstýrið**

Vanligi lóggávuhátturin, sum hevur við sær, at landsstýrið leggur uppskot fyri løgtingið, sum skal viðgerast tríggjar ferðir og annars fylgja teimum ásetingum, sum eru í tingskipanini um lógararbeiði – umframt mannagongdirnar hjá landsstýrinum frammanundan tingviðgerðini – hevur við sær, at tað kann taka (ov) langa tíð at seta lóggávu í gildi, sjálvt um møguleiki er fyri afturvirkandi virknaði. Samstundis kann hesin leistur tykjast møtimikil í teimum førum, tá tað er neyðugt at tillaga lóggávu so hvørt. Tí kann tað umhugsast, um løgtingslógin heldur skal innihalda eina heimild til landsstýrið at áseta nærri reglur í kunngerð.

Tá heimildir til landsstýrið verða umhugsaðar, eigur serliga valdsbýtið at vera tikið við. Stýrisskipanarlógin ásetur, at lóggávuvaldið hjá Løgtinginum og løgmanni í felag. Tó kann landsstýrið ella stovnur undir landsstýrinum í nærri ásettan mun við løgtingslóg fáa heimild til við kunngerð at áseta rættarreglur av almennum slagi. Stýrisskipanarlógin avmarkar sostatt, hvørjar reglur landsstýrið kann fáa heimild at áseta.

Sum greitt frá undir nr. 1.4 í Rundskrivi um Lógarsmíð eru kunngerðir eins og løgtingslógir beinleiðis bindandi fyri bæði borgarar, vinnulív o.o. Meðan løgtingslógir kunna hava ásetingar um alt, sum ikki gongur í móti hægri yvirskipaðari lóg, so sum grundlóg, heimastýrislóg ella stýrisskipanarlóg, so kunnu kunngerðir bert áseta almennar rættarreglur í nærri ásettan mun, sum eru innan fyri heimildina í løgtingslógini.

Hetta merkir, at grundleggjandi reglur eiga ikki at ásetast í kunngerð. Hóast ein heimild í løgtingslóg kann vera heilt víð, so eiga grundleggjandi reglur ikki at ásetast í kunngerð, tí hetta er ikki í tráð við stýrisskipanarlógina. Kunngerðir kunnu sostatt bert nágreina tað, sum longu er ásett í løgtingslógini. Ásetingar um grundleggjandi reglur fyri borgaran, vinnulív o.o. skulu standa í løgtingslógini.

Fleiri av teimum samtyktu kreppulógunum innihalda víðar heimildir til landsstýrismannin. Serliga kunnu løgtingslóg um heimildir at víkja frá skyldum hjá fyritøkum á vinnufelagaøkinum og roknskaparøkinum orsakað av COVID-19 (løgtingslóg nr. 46 frá 7. apríl 2020) og løgtingslóg um serligar reglur um próvtøkur orsakað av COVID-19 (løgtingslóg nr. 48 frá 7. apríl 2020) takast fram. Felags fyri fleiri av heimildunum, er, at tær heimila landsstýrismanninum í kunngerð at víkja frá ásetingum í øðrum løgtingslógum.

Slíkar ásetingar, sum geva landsstýrismanninum heimild at víkja frá øðrum løgtingslógum, eru víttgangandi og eiga tí at verða nýttar við varsemi, soleiðis at tað kann verða tryggjað, at galdandi lóggáva altíð er innanfyri teir karmar – og tað valdsbýti – sum stýrisskipanin setur.

At tað er løgtingið, sum samtykkir tær heimildir, sum landsstýrinum verða givnar, er sjálvsagt við til at tryggja, at landsstýrið ikki fær ov víðar heimildir. Tað kann tó í ávísum førum verða torført at meta um, hvussu ein heimild verður nýtt, og hvussu hon verður tulkað, serliga tá tað – tá lógin verður samtykt – ikki er greiða á t.d. júst hvørjum ásetingum landsstýrið vil víkja frá.

**2.3. Fyrireikingararbeiði og broytingar í broytingum**

Løgmaður boðaði á grækarismessu, hósdagin 12. mars 2020, frá, at Føroyar skuldu niður í ferð fyri at tálma spjaðingini av COVID-19. Seks dagar seinni – mikudagin 18. mars 2020 – var hjálparpakki I viðgjørdur í løgtinginum. Av tí, at álvarsama støðan við COVID-19 kom í rættuliga brádliga, er eingin ivi um, at lógarfyrireikandi arbeiði við løgtingslógunum, sum vórðu samtyktar 18. mars 2020, var sera stutt. Tíð hevur t.d. ikki verið til at senda uppskotini til ummælis.

Seks av teimum 11 løgtingslógunum hava verið broytingarlógir, meðan fimm hava verið nýggjar høvuðslógir. Allar nýggju høvuðslógirnar vóru við í seinna umfari og viðgjørdar í løgtinginum í apríl 2020.

Tvær av broytingarlógunum og ein høvuðslóg (løgtingslógirnar nr. 42, 43 og 44 frá 7. apríl 2020), sum vóru við í hjálparpakka II, innihildu tillagingar av broytingum, sum vóru gjørdar í sambandi við hjálparpakka I.

Tað ber illa til at draga endaligar niðurstøður grundað á hetta, tó at tað er ein lítil ábending um, at tá lógararbeiðið skal ganga so skjótt, sum tað gjørdi í sambandi við hjálparpakka I – og tá vikið verður frá teimum mannagongdum, sum vanliga eru í sambandi við lógarsmíð, undir hesum ummæli og vanligu tíðarfreistirnar í løgtinginum – eru størri sannlíkindi fyri, at okkurt verður gloymt, og at feilir verða gjørdir. Hetta hevur við sær, at nýggj lóggáva er neyðug, og at øll lóggávugongdin skal ganga av nýggjum.

Hóast tað í hesi serligu undantaksstøðu hevur gingið so skjótt, at onkur feilur av misgáum er íkomin, vísa tær royndir, sum eru gjørdar seinastu tíðina, at tað er møguligt hjá landsstýri og løgtingi at bera skjótt at, og at seta heilt nýggjar serskipanir í gongd innan sera stutta tíð. Hetta er – hóast onkran feilin – at frøast um.